**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Deildin fyri Sinnisveik*
*Løkjutún 1*
*FO-160 Argir · Tlf. 354020 · Telefax 354021*

# Deildin fyri sinnisveik søkir eftir 5 starvsfólkum til nýggja sambýlið á Traðarvegi í Sandavági

Í sambýlinum koma at búgva 4 sinnisveik fólk, ið hava tørv á eginumsorgan, tryggleika og einum struktureraðum gerandisdegi.

Tað verða fleiri aktivitetir bæði inni og uttan fyri húsið, har starvsfólkini fara at luttaka aktivt saman við búfólkunum.

**Arbeiðið hjá starvafólkunum fevnir um:**
- At stimbra og menna praktiskar og sosialar førleikar hjá búfólkunum.
- At stimbra ígongdsetan av virksemi, íð búfólkini ynskja ella hava tørv á.
- At geva ráð og vegleiðing í vanligum dagligum virki, so sum matgerð, reingerð, klædnavaski, handilsørindum og øðrum, samstundis sum atlit verður tikið til, hvat búfólkini megna.
- At skipa so fyri, at búfólkini fáa møguleika at leggja gerandislív sítt soleiðis til rættis, at tað verður í samsvar við egnan tørv og normar.

**Førleikakrøv:**
Vit vænta, at tú:
- er tolin og hevur eina positiva menniskjafatan.
- kann handfara og trívast við einum arbeiðsdegi, íð onki kann sigast um frammanundan.
- ert sterkur bæði til likams og sálar.
- hevur royndir innan psykiatriska økið.
- hevur áræði.
- hevur hug og hegni at arbeiða sjálvstøðugt.

**Lønar- og setunartreytir:**
Talan er um 5 fulltíðarstørv innan Heimarøktina og Serforsorgina og roknast má við, at arbeiðstíðirnar eru skiftandi. Tað eru dag-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisvaktir.

Løn sambært Føroya Psykiatrifelag, Føroya Pedagogfelag, Felagið føroyskir sjúkrarøktarafrøðingar, Heilsuhjálparafelag Føroya, Almanna og heilsurøktarafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Tann, íð settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at hetta kann verða umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur.

Fleiri upplýsningar um størvini eru at fáa hjá Signu Andreasen, leiðara, tlf. 333213.

**Umsóknarfreistin er sett til tann 25. oktober 2005., og umsóknir skulu sendast til:**

**Deildin fyri sinnisveik**
Att: Regin Johansen
Løkjatún 1
160 Argir

-har tað hendir

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin

**KOYRIKORT?**

Hugsar tú um at ogna tær koyrikort til persónbil so er møguleikin her.
Nýtt hold byrjar 17. oktober.
Tilmelding á fartel 73 74 75

Postboks 133, 110 Tórshavn,
www.koyrilararin.fo

**KOYRILÆRARIN**
/Benny Ejdesgaard

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 2246,**
Sp/f Era, 160 Argir.
**Viðtøkur broyttar:**
04.10.2005
**Navn:**
**Nýtt navn:**
Sp/f Drainsoft
**Hjánøvn:**
**Nýggj hjánøvn:**
Sp/f loppan.fo (Sp/f Drainsoft), Sp/f Vital (Sp/f Drainsoft)
**Nevnd:**
**Innkomin í nevndina:**
Thomas Ari Brockie, Traðarbrekka 8, 100 Tórshavn (nevndarformaður)
Jan Joensen, Hiort Lorentzens Gade 23, 1.tv., 2200 København N (nevndarlimur)
Uni Dahl, Kagså Kollegiet 103, 2730 Herlev (nevndarlimur)
Benny Scott Brockie, J. C. Svabosgøta 12, 2.th., 100 Tórshavn (nevndarlimur)
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:**
Erland Hentze Rasmussen, Høvdagøta 5, 160 Argir
**Innkomin sum stjóri:**
Benny Scott Brockie, J. C. Svabosgøta 12, 2.th., 100 Tórshavn
**Tekningarreglur:**
Felagið verður bundið við undirskrift av nevndarformanni ella av felagsins stjóra.
**Endamál:**
Endamál felagsins er at reka handil.

*Skráseting Føroya*
*tann 06. oktober 2005*

*Kristin Balle*

# Avloysari

## til Mýrifípuna og Útibarnagarðin í Trongisvági

**Stovnslýsing:**
Á Mýrifípuni ganga 90 børn í aldrinum 0-7 ár. Stovnurin er skipaður í 5 eindir, ein vøggustova, tríggjar barnagarðsstovur, harav ein hálvdagsstova, ein heildagsstova og ein útibarnagarðsstova.

**Starvið:**
Søkt verður eftir kallivakari/avloysara, ið kann koma til arbeiðis tá ið vit mangla starvsfólk av ymsum orsøkum.
Arbeiðstíðin er sera skiftandi, tó millum kl. 07.30 - 18.00.

**Vit vænta av tær:**
- At tú hevur góð samstarvsevnir og ert álítandi.
- At tú vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfelagum.
- At tú ert nærverandi og dugir at taka ábyrgd
- At tær dámar at verða úti í øllum veðri
- At tú hevur hug til at arbeiða skiftandi arbeiðstíðir kring allan stovnin

**Lønarviðurskifti:**
Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Guðrun ella Bitiru á tlf. 372700.
Umsókn skal verða Dagstovninum í hendi í seinasta lagi 21. oktober 2005.

TVØROYRAR KOMMUNA

JAVNI

# Eykaaðalfundur hjá Javna

Eykaaðalfundurin hjá Javna verður 29. oktober kl. 15.00 á Verkstaðnum Vón.

Á skránni verður:

- Val av formanni og
- Val av starvsnevndarlimi

KEYP SPORTSFELGUR...




...við dekkum á alnótini

WWW.NORMEK.FO
FO-512 NORÐRAGØTA
TEL 44 20 02 · FAX 44 20 22

LEIGA AMBOÐ & MASKINUR

Kaj Andreasen & Co
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00

Lesið Sosialin -so eru tit við!